## Hví goyggja hundar?



Sjálvi eru vit menniskju sera málslig, men hundagoyggj kann verða ilt at skilja. Hundagoyggj er fyri summar hundaeigarar gerandiskostur og fyri onnur bert ein trupulleiki, ið grannin hevur. Men er hetta nakað, ið til ber at arbeiða við ella møguliga bøta um? Hvat sigur lógin um hundagoyggj? Sjálvsagt eru summir hundar aldir fram við eginleikanum at goyggja, men alt í alt er hetta einasti málsligi hátturin hjá hundinum at samskifta við okkum. Nú kunnu hundaeigarar og onnur áhugað hoyra meiri um hetta fyribrigdi leygardagin 5. Juli kl. 16 á Argjaskúla. Tá skipar Hundaeigarfelag Føroya fyri fyrilestri um „Hví goyggja hundar“við Ninu Brockie.

## Løgreglan skal leita eftir skøkjum

Hóast norska Stórtingið fyri einum hálvum ári síðani samtykti eina lóg, sum bannar fólki at keypa sex, so eru framvegis nógvir seljarar í miðbýnum í Oslo. Síðsta leygarkvøld taldi ein áhugafelagsskapur ikki færri enn 121 kvinnur, sum gingu í miðbýnum og bíðaðu eftir keyparum. Talan var serliga um kvinnur úr londum í Eysturevropa og úr Nigeria. Ein talsmaður fyri løgregluna í Oslo sigur við Aftenposten, at talið er størri, enn løgreglan hevur hildið. Hann sigur, at løgreglan fer nú at halda eyga við støðuni við at herða eftirlitið í miðbýnum í Oslo.

# Síging í Lonini í Sandoynni

**Sandoyar Kunningarstova sigur frá, at síging/rapelling verður í Sandoynni leygardagarnar 18. og 25. juli**



FRÍTÍÐ

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú er møguleiki fyri at síga í 300 m hædd í Lonini vestanfyri á Sandoynni.

Kunningarstovan í Sandoynni sigur, at fyri tey, sum koma norðanfjørðs, verður skipað fyri bussambandi úr Skopun til Søltuvíkar og aftur. So ongum nýtist at taka bil við yvirum.

Teistin siglir av Gomlurætt kl. 8.45 – har leigaður bussur stendur fyri fólki. Síðani verður koyrt til Søltuvíkar, har ferðaleiðari vísir veg til Lonina. Gongutúrurin tekur uml. 1 tíma og 15 min. Síðani verður kaffi, te og føroyskur viðskeri bjóðaður í húsinum í Lonini. Eftir tað verður so sigið. Tó skal tað sigast, at um ein ikki sígur, so kann viðkomandi sagtans fáa ein frálíkan túr kortini. Náttúran er størsligin og vøkur.

At ganga heimaftur tekur uml. 45 min. Síðani verður farið við bussi aftur til Skopunar – har siglt verður kl. 16.30. Sagt verður at skilagott er at hava heit og góð klæði við á túrinum. Túrurin verður gjørdur um tað viðrar og nóg nógv tekna seg.

Bólkar og fyritøkur kunnu eisini bíleggja sær túrar gjøgnum summarið. Meira fæst at vita á www.visitsandoy.fo.

# Føroyingar smittaðir av salmonella fongdum eggum

**Nakrir føroyingar og áleið 40 danir eru vorðnir smittaðir við Salmonella Enteritidis síðani mai mánað í ár**



HEILSA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Matvørudeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni sigur, at fleiri av teimum smittaðu hava etið egg, sum ikki hava verið gjøgnumhitað, antin sum stokt egg ella sum ráar eggjablommur á búffum.

Í fleiri førum koma eggini, sum eru etin, frá Møllebjerggård Ægpakkeri.

Danska Fødevarestyrelsen hevur neyvt eftirlit við einum garði, sum selir egg til Møllebjerg Ægpakkeri, av tí at illgruni er um salmonella á garðinum.

Neyva eftirlitið merkir, at garðurin ikki kann selja egg, fyrr enn Fødevarestyrelsen hevur kannað egg frá garðinum fyri salmonella og einki funnið.

### Eggini seld í Føroyum

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur fingið upplýsingar frá danska Fødevarestyrelsen um, at egg frá Møllebjerggård Ægpakkeri, sum eru undir illgruna fyri at verða fongd við salmonella, eru seld í Føroyum.

### Merking og haldføri

Talan eru um egg frá búrhønum, sum eru í pakkum við 6, 10 ella 30 stk. við haldføri 26. mai til 27. juli 2009. Í hesum tíðarskeiði eru egg frá fleiri gørðum pakkað á Møllebjerggård Ægpakkeri, men illgrunin og afturkallingin umfatar bert egg, sum eru stemplað við CHR-nr. 52395.

### Takast av hillunum

Fødevarestyrelsen hevur álagt Møllebjerggård Ægpakkeri at afturkalla eggini, sum eru undir illgruna. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur givið føroyska innflytaranum boð um at afturkalla egg, sum eru seld til føroyskar handlar.

Orsøkin til hesa afturkallingina er illgruni um smittu við Salmonella Enteritidis. Hendan bakteria er sjúkuelvandi, og fólk fáa diarré, vaml, ilt í búkin, fepur og spýggja.

### Tilmæli til fólk

Heilsufrøðiliga starvsstovan mælir fólki, sum hava keypt hesi egg, til at fara aftur í handilin við teimum ella beina tey burtur.

Tá ið egg skulu nýtast í mati ella kakum, sum ikki verða gjøgnumhitað, mælir Heilsufrøðiliga starvsstovan fólki til at nýta pasteuriserað egg.


ADVOKATSKRIVSTOVAN

TVINGSILS-SØLA

**Týsdagin tann 18. august 2009 kl. 10.30**, verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 883, Tórshavn.**

Ognin er eini sethús innrættað til privatan bústað og útleigan í trimum hæddum, til støddar uml. 120 m² hvør hæddin, umframt ovasta loft uml. 65 m². Grundøkið er uppá 405 m².

Húsini eru av betong og takt við Icopal. Húsini eru innrættað soleiðis:

**Kjallarahædd:** Sjálvstøðugur verkstaður. Íbúð v/stovu, kamari, wc, millumgongd, køki, fýrrúmi og gongd.

**2. hædd:** Durur, gongd, hjallur, vásakøkur/brüggers, wc, køkur, stova, skrivstova og kamar.

**3. hædd:** Trý kømur, hjúnakamar v/altan, rúm ætlað til wc, kamar og wc.

**4. hædd:** Stór loftsstova í einum.

Sølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, advokati, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35, e-mail ojk@jura.fo** (j. nr. 20080953), ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssøluuppstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
tann 30/6-2009

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO